## Kreppuraktur klassikari

Mikukvøldið spæla Formula-liðini hjá KÍ og HB landskappingardyst við Djúpimýru. Dysturin er framskundaður, nú KÍ um vikuskiftið skal spæla Inter-toto dyst. Ofta hava gull og æra staðið upp á spæl, tá liðini havt hitst, men hesa ferð er tað tó mest æran í so máta. KÍ kann so als ikki loyva sær at hugsa gyltar tankar, men er tað ístaðin lívið í deildini, sum tað ræður um at bjarga. Til hetta hava teir við einum undantaki allar mans tøkar. Símun Joensen fekk um vikuskiftið sítt áttanda gula kort, og tí er hann leikbannaður. Nýggjur maður í hópinum verður helst Kristian á Lakjuni. Hjá HB er lagið í botni eftir tapið í Runavík, og tey flestu munnu helst halda, at liðið nú er úti úr gulldystinum. Og í øllum førum er neyðugt við trimum stigum í Klaksvík, um tann dómurin ikki skal vera heilt definitivur. Til dystin hevur HB ikki Hans á Lag, sum fekk reytt kort seinast. Hartil er ivasamt, um Jákup á Borg er tøkur. Hann hitaði upp seinast, men fekk ikki tikið lut í sjálvum dystinum.

# Eysturoyingur í serflokki

**Sjálvt um Vestmenningur royndi at hanga í, so vann Eysturoyingur enn ein tryggan sigur í 10-mannaførum hjá monnum. Stuttligt var tó at síggja, at Havnar Róðrarfelag hevði mannað Havnarbátin**

KAPPRÓÐUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tey flestu mundu helst vænta, at Eysturoyingur fór at vinna enn ein tryggan sigur í næsta róðrinum á árinum á Sundalagsstevnuni. Í fyrsta róðrinum hevði Eysturoyingur tó bert ein bát at kappast við, men til róðurin á Sundalagsstevnu vóru nú tríggir bátar við, eftir at Havnar Róðrarfelag hevði mannað flaggskipið, Havnarbátin.



*Eysturoyingur vann enn ein tryggan sigur á Sundalagsstevnuni, men tað var ikki fyrrenn seinastu 500 metrarnar, at Eysturoyingur veruliga fór frá Vestmenningi.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

At Havnarbáturin var mannaður gjørdi tó ikki tann stóra munin. Teir høvdu bert vant einaferð undan Sundalagsstevnuni, og skjótt var greitt, at teir megnaðu ikki at fylgja við henda dagin.

Hinvegin gjørdist Vestmenningur nógv drúgvari enn á Norðoyastevnu. Sjálvt um Eysturoyingur legði seg væl fram um frá byrjan, so høvdu vestmenningar ongan hug at gevast. Teir hingu í Eysturoyingi, og tá tað restaðu 500 metrar, var bert á leið ein bátslongd á muni.

Síðstu løtuna vísti Eysturoyingur tó sína sonnu styrki, og tá teir komu á mál vóru teir tríggjar bátslongdir frammanfyri Vestmenning, men Vestmenningur vísti stóran part av málinum, at teir á einum góðum degi kunnu fylgja rættiliga væl við Eysturoyingi.

Havnarbáturin endaði knøpp 40 sekund aftanfyri Eysturoying á triðja plássi, men teir høvdu neyvan væntað sær eitt serliga gott úrslit í fyrsta róðrinum hjá teimum.

### Úrslit á Sundalagsstevnuni

**5-mannafør dreingir**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Havfrúgvin | 05:02.11 |
| 2 | Sílið | 05:05.16 |
| 3 | Teistin | 05:07.04 |
| 4 | Tjaldrið | 05:13.13 |
| 5 | Jallurin | 05:14.23 |
| 6 | Blikur | 05:17.10 |
| 7 | Jomfrúgvin | 05:19.20 |
| 8 | Falkur | 05:29.12 |

**5-mannafør gentur**

| Nr | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Hvassi | 05:27.23 |
| 2 | Tambar | 05:29.24 |
| 3 | Drekin | 05:31.16 |
| 4 | Ørnin | 05:38.00 |
| 5 | Blikur | 05:46.13 |
| 6 | Teistin | 05:47.21 |

**5-mannafør kvinnur**

| Nr | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 05:15.08 |
| 2 | Fípan Fagra | 05:15.17 |
| 3 | Sílið | 05:15.21 |
| 4 | Ørnin | 05:17.00 |
| 5 | Ritan | 05:19.04 |
| 6 | Teistin | 05:19.18 |
| 7 | Jallurin | 05:26.18 |
| 8 | Erla Kongsdóttir | 05:36.23 |
| 9 | Blikur | 05:47.09 |

**6-mannafør kvinnur**

| Nr | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 05:15.17 |
| 2 | Kollfriðingur | 05:25.03 |
| 3 | Hvessingur | 05:47.04 |
| 4 | Smyril | 05:49.10 |

**6-mannafør menn**

| Nr | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Tvørabáturin | 07:11.16 |
| 2 | Sundabáturin | 07:11.18 |
| 3 | Strálan | 07:13.03 |
| 4 | Jarnbardur | 07:20.03 |
| 5 | Sølmundur | 07:24.17 |
| 6 | Lómur | 07:25.05 |
| 7 | Rádni | 07:30.16 |
| 8 | Riddarin | 07:31.13 |

**8-mannafør menn**

| Nr | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Heiðabáturin | 06:51.24 |
| 2 | Argjabáturin | 06:55.05 |
| 3 | Ørvur | 06:59.07 |
| 4 | Knørrur | 07:07.15 |
| 5 | Árnfirðingur | 07:08.05 |

**10-mannafør menn**

| Nr | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 09:08.01 |
| 2 | Vestmenningur | 09:14.15 |
| 3 | Havnarbáturin | 09:47.17 |

### FM-kappróður

| | **5-mannafør, dreingir** | **Stig íalt** | **Sundalagsst.** |
|---|---|---|---|
| 1 | Havfrúgvin | 12 | 7 |
| 2 | Sílið | 12 | 5 |
| 3 | Teistin | 8 | 4 |
| 4 | Tjaldrið | 5 | 3 |
| 5 | Jallurin | 3 | 2 |
| 6 | Jomfrúgvin | 3 | 0 |
| 7 | Blikur | 1 | 1 |
| | **6-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 | Jarnbardur | 14 | 7 |
| 2 | Kollfirðingur | 9 | 4 |
| 3 | Lómur | 5 | 5 |
| 4 | Smyril | 4 | 4 |
| 5 | Hvessingur | 2 | 2 |
| | **5-mannafør, gentur** | | |
| 1 | Hvassi | 14 | 7 |
| 2 | Tambar | 10 | 5 |
| 3 | Drekin | 8 | 4 |
| 4 | Ørnin | 6 | 3 |
| 5 | Blikur | 4 | 2 |
| 6 | Teistin | 2 | 1 |
| | **5-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 | Sílið | 11 | 4 |
| 2 | Frúgvin | 10 | 7 |
| 3 | Fípan Fagra | 9 | 5 |
| 4 | Teistin | 6 | 1 |
| 5 | Ørnin | 5 | 3 |
| 6 | Ritan | 3 | 2 |
| | **6-mannafør, menn** | | |
| 1 | Sundabáturin | 12 | 5 |
| 2 | Tvørabáturin | 11 | 7 |
| 3 | Strálan | 9 | 4 |
| 4 | Jarnbardur | 6 | 3 |
| 5 | Sølmundur | 2 | 2 |
| 6 | Lómur | 2 | 1 |
| 7 | Riddarin | 2 | 0 |
| | **8-mannafør** | | |
| 1 | Heiðabáturin | 14 | 7 |
| 2 | Argjabáturin | 10 | 5 |
| 3 | Ørvur | 8 | 4 |
| 4 | Knørrur | 6 | 3 |
| 5 | Árnfirðingur | 4 | 2 |
| | **10-mannafør** | | |
| 1 | Eysturoyingur | 14 | 7 |
| 2 | Vestmenningur | 10 | 5 |
| 3 | Havnarbáturin | 4 | 4 |